# Heldur seg einki skeivt hava gjørt

*Signar á Brúnni, lanndsstýrismaður, sigur, at hann ráðførdi seg væl og virðiliga áðrenn hann í juni játtaði sjónvarpinum pening uttan heimild. Tí metir hann seg hava ryggin fríán*

JOHN JOHANNESSEN

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum staðfestir, at Signar á Brúnni, landsstýrismaður, breyt landsins lógir, tá hann í juni játtaði Sjónvarpi Føroya pening uttan heimild.

Advokaturin, Bjørn á Heygum, ið hevur verið við til at gjørt stýrisskipanarlógina, heldur brotið vera so stórt, at landsstýrismaðurin má frá, skal álitið á rættartrygdina halda fram.

Landsstýrismaðurin stendur kortini fast við, at hann hevur sín rygg fríán.

– Tá eg játtaði sjónvarpinum peningin, ráðførdi eg meg við fíggjarfrøðingar og lógarkøn fólk bæði innan mítt egna stýri og uttanfyri. Hesi vóru øll samd um, at eg skuldi gera, sum eg gjørdi. Tí meti eg meg ikki hava gjørt nakað skeivt, sigur Signar á Brúnni.

### Fíggjarnevndin sveik

Tað er staðfest, at landsstýrismaðurin játtaði peningin til sjónvarpið uttan um játtandi myndugleikan, nevniliga løgtingið.

Men landsstýrismaðurin hevur eina frágreiðing til hetta. Signar á Brúnni vísir á, at hann áðrenn hann játtaði peningin bað um fund við fíggjarnevnd løgtingsins.

– Eg vildi nevniliga, at alt skuldi ganga eftir lógini í hesum máli, og fyri tí gjørdi eg alt tað, eg kundi, sigur landsstýrismaðurin.

Signar á Brúnni sigur, at fundurin í fíggjarnevndini aldi bleiv til nakað, hóast fíggjarnevndin í fyrstu atløgu hevði játtað at taka málið upp.

– Brádliga vísti fíggjarnevndin málinum frá sær, og so var ikki annað at gera, enn at játta peningin, sigur Signar á Brúnni og vísir á, at talan var um eina ógvuliga akutta støðu, og tí mátti handlast skjótt.

### Stjórin fingið nøs

Osrøkin til, at Signar á Brúnni játtaði peningin til Sjónvarp Føroya var, at sjónvarpið brádliga var komið í ógvusligar fíggjarligar trupulleikar.

Sjónvarpsstjórin boðaði frá stórum undirskoti í rakstrinum og boðaði frá, at hetta komst av, at útreiðslusíðan á fíggjarætlan stovnsins hevði hildið, meðan útreiðslusíðan ikki hevði hildið.

Spurningurin til landsstýrismannin er tískil, um hann ikki heldur átti at umhugsa leiðsluevni stjórans í staðin fyri at bróta sína ráðharraábyrgd.

– Satt at siga, var møguleikin fyri at koyra sjónvarpsstjóran frá viðgjørdur. Men vit valdu, at stjórin heldur skuldi fáa ein nøs, sigur Signar á Brúnni.

### Viðgera málið

Tjóðveldisflokkurin viðgjørdi á fundi hóskvøldið og aftur seinnapartin fríggjadagin niðurstøðu løgtingsgrannskoðaranna.

Áðrenn blaðið fór til prentingar var fundurin ikki komin til nakra niðurstøðu. Men Signar á Brúnni váttar, at hann var viðgjørdur á fundinum hóskvøldið. Hann sigur, at hann á fundinum slapp at greiða frá støðu síni, og síðani var kjakast um málið. Meira vil hann ikki siga.

Eisini Høgni Hoydal og Heini O. Heinesen vátta, at hesir fundir hava verið, men heldur ikki teir vilja siga, um flokkurin hevur tosað um, at heita á Signar á Brúnni um at siga seg úr landsstýrissessinunm, fyri at tryggja álitið á flokkin.

Tó sigur Heini O. Heinesen, formaður Tjóðveldisfloksins, so mikið, at hann ikki kann góðtaka, landsstýrismenn bróta landsins lógir.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa viðmerkingar frá løgmanni, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Signar á Brúnni metir seg einki skeivt hava gjørt, tá hann játtaði sjónvapinum pening*


*Anna Højgaard og Boði Haraldson:*
*"Vit gleða okkum at seta føtur undir egið borð. Tá vit skuldu byggja, tóku vit lán í Føroya Banka. Vit hava fingið eina góða ráðgeving, soleiðis at vit ikki sita fyri meira, enn vit klára, og ikki koma illa fyri av óvæntaðum útreiðslum."*



petur & petur - 320870

"Tað ræður um at velja rætt - tí valdu vit Føroya Banka"

**Visti tú,** at um tú ert viðskiftafólk hjá Føroya Banka, so hevur tú tín egna persónliga ráðgeva?

Hann ráðgevur um øll tíni fíggjarligu viðurskifti, serliga tá tað snýr seg um sethúsafígging, lán við trygging, samlagstrygging, sethúsa- og familjutrygging og biltrygging.

Hetta hevur bankin gjørt fyri at laga virksemið eftir tínum tørvi. Bankin setur seg inn í tína støðu, soleiðis at tín gerandisdagur kann gerast lættari, betri og bíligari.

Ætlar tú at seta búgv ella hevur sett búgv og ætlar at umbyggja, er Føroya Banki rætti bankin at tosa við.

Føroya Banki kann bjóða tær dygdartænastur fyri kappingarførar prísir.

FØROYA BANKI




# TV2 eru komnir at mekla

*– Nyrup hevur ikki sent okkum higar, men tað hevði verið skilagott, um hann hevði gjørt tað, sigur Steffen Brandt, oddamaðurin í danska poppbólkinum TV2*

EYÐUN KLAKSTEIN

Í gjárkvøldið fór danski poppbólkurin TV2 á pallin í Havn, og sambært oddamanninum í bólkinum skuldi hjáveran hjá TV2 skiljast sum ein meklingarroynd, nú viðurskiftini millum Føroyar og Danmark hava verið nakað heit seinastu dagarnar.

– Nyrup hevur ikki sent okkum higar, men tað hevði verið skilagott, um hann hevði gjørt tað, sigur Steffen Brandt, leiðari í TV2.

– Vit hava stúrt eitt sindur fyri ferðini til Føroya, tí støðan er eitt sindur undarlig í løtuni, men vit eru sera væl móttiknir, hóast tað fer fram ein politisk uppgerð millum Føroyar og Danmark í løtuni.

### Vit hava nakað í felag

TV2 løgdu arbeiði við nýggju fløguni til síðis fyri at sleppa aftur til Føroya, her teir ikki hava verið síðani 1992.

– Vit kundu havt vunnið fleiri pengar lættari aðrastaðni, men tað hevur týdning fyri okkum, at vit fáa samband við føroyingar aftur, segði Steffen Brandt á tíðindafundinum, sum var hildin í Svimjihøllini í Havn fyrrapartin í gjár.

– Vónandi kann TV2 vera við til at minna, at føroyingar og danir hava nakað í felag, og tað er ikki bara nakað, sum vit kunnu viðfara soleiðis, sum politikararnir gjørdu undir samráðingunum í síðstu viku.

– Eg fari at geva Anfinni Kallsberg rætt í, at hetta eru samráðingar, sum skulu førast yvir eina longri tíð, og tí er tað óhóskandi, at kjakið skal fara fram sum yvirskiftir í bløðunum, heldur Steffen Brandt.

### Meira verdugt

Steffen Brandt væntaði sær nógv av framførsluni í gjárkvøldið, og hann ætlaði sær ikki at gera so nógv burtur úr støðuni millum Føroyar og Danmark við orðum, men meira við hjáveruni.

– Eg haldi ikki, at vanliga fólkið í Danmark og Føroyum eru í stríði við hvør annan, soleiðis sum politikararnir kanska hava verið seinastu dagarnar. Eg kenni bara til beinasemi mótvegis føroyingum millum vanliga danan.

– Eftir allar hesir øldirnar saman, haldi eg, at tað er burturvið, at slíkt stríð skal taka seg upp, nú Føroyar ynskja at sleppa úr ríkisfelagsskapinum. Tað er eingin natúrlóg sum sigur, at Føroyar og Danmark hoyra saman, og eg haldi, at politikararnir eiga finna eina meira verduga loysn, enn tað var lagt upp til undir fyrstu samráðingunum.



**TV2 á tíðindafundi í Svimjihøllini í Havn í gjár. Steffen Brandt tosaði fyri tað mesta, og hann segði seg vera komin til føroyar at mekla millum føroyingar og danir. Mynd: Jens Kristian Vang**

# Flogfelagið gjørt avtalu við tyrlufelag

*Flogfelag Føroya er farið undir samstarv við Scotia Helicopters, sum ætlar sær við í oljuvinnuna á føroyskum øki*

EYÐUN KLAKSTEIN

Flogfelag Føroya hevur gjørt ein avtalu við skotska felagið Scotia Helicopters um samstarv á føroyskum øki.

Scotia Helicopters er áhugað at sleppa við í virksemi, sum oljuleitingin í Føroyum fer at hava við sær, og saman við Flogfelagi Føroya ætlar skotska felagið at etablera seg í Føroyum.

– Hetta er ein natúrlig víðkan av okkara virksemi, og avtalan fer at hava eitt fíggjarligt íkast við sær til okkara felag, sigur Uni Danielsen, stjóri í Flogfelag Føroya.

Scotia Helicopters, sum hevur høvuðsstøð í Aberdeen, er eitt dóttirfelag hjá stóra kanadiska felagnum Canadian Helicopter Corporation, og samanlagt hevur hetta felagið 370 tyrlur undir sínum veingjabreiði.

### Støð í Føroyum

Enn er ikki greitt, hvussu stórt virksemi hjá Scotia Helicopters verður í Føroyum, tað veldst um, hvat úrslitið verður av fyrstu útbjóðingarumfarinum.

Skotarnir flúgva í løtuni fyri fleiri av teimum feløgunum, sum eru áhugað í at sleppa við í eina føroyska oljuvinnu, og um tað eydnast onkrum av hesum feløgum at sleppa upp í part í Føroyum, er tað ein natúrlig avleiðing, at Scotia Helicopters skal taka sær av neyðugu flúgvingini.

– Men skotarnir koma helst at hava eina støð í Føroyum við einari ella fleiri Super Puma tyrlum. Enn vit vita ikki, hvussu umfatandi virksemi er, men vit verða helst noyddir at gera útbyggingar í Vágum fyri at fáa meira hangarpláss til tyrlurnar, sigur Uni Danielsen.

Hann heldur, at í longdini fer samstarvið við Scotia Helicopters at hava við sær, at fleiri kunnu fáa størv hjá Flogfelagnum.

### Brúka føroyingar

Scotia Helicopters ger nógv burtur úr at brúka lokal fólk, har teir hava sínar støðir. Soleiðis er til dømis í Esbjerg, har nógvir danir starvast hjá skotunum.

– Og soleiðis verður eisini í Føroyum. Scotia Helicopters fer at bjóða bæði lærlingapláss og arbeiði til føroyingar, sigur Uni Danielsen.

– Alt veldst sjálvandi um, hvussu nógvar aktiviteturin verður á føroyskum øki, men vit vænta, at tað fer at spyrjast okkurt munagott burtur úr samstarinum.

Flogfelag Føroya, sum varð stovnað í 1963, tekur sær av øllum virkseminum hjá Maersk í Føroyum, og tí skulu fáa íløgur til, nú felagið skal taka sær av virkseminum hjá Scotia Helicopters.

Støðin í Føroyum verður í Føroyum, og har er ætlanin at Flogfelagið skal taka sær av check-in, umsiting, trygd og øðrum, sum Scotia Helicopters hava fyri neyðini.

– Hetta er einki nýtt fyri okkum, tí vit umsita dagliga alt virksemi hjá Maersk, og vit hava áður havt smærri flogfør sjálvi, sigur Uni Danielsen.


SANGKAPPING

**Skriva ein góðan sang...**
**...og vinn 10.000 krónur!**

Goymir tú eitt lítið tónaskald ella ein spírandi yrkjara innan í tær, er henda sangkappingin uttan iva júst nakað fyri teg!

Øll eru vælkomin at senda inn sangir og løg til sangkappingina, sum er útskrivað í sambandi við fløguútgávu við føroyskum sangarum og tónleikarum.

**Sangkappingin og fløguútgávan eru partur av einum størri tiltaki, sum hevur til endamáls at gera vart við umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum og teirra avvarðandi.**

Hav hetta í huga, tá tú skrivar tín sang ella gert títt lag til kappingina!

Virðislønir verða latnar trimum teimum bestu í kappingini, og er ein dómsnevnd sett at velja hesi millum øll tey innkomnu uppskotini.

Virðislønirnar eru ávikavist 10.000, 5.000 og 3.000 krónur, so tað loysir seg at gera eina roynd...

Vilt tú hava meira at vita, kanst tú vitja heimasíðuna

http://sangkapping.cjb.net

ella senda eitt teldubræv til

sangkapping@sangkapping.cjb.net.

Ikki er neyðugt hjá tær at gera eina studio-upptøku, men send bara eitt kassettuband við sanginum á einfaldasta hátt, t.d. sangur/guitar ella sangur/klaver.

Freistin at lata sangir inn til kappingina er ***31. mars 2000***, og sangir og løg skulu sendast til:

**Vælskapt Brek**
**Postboks 2208**
**FO-165 Argir**

SANSIR · TEL 355 355